# Nøvn

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



## Bjarni Filholm skrivar um Drotningina

Rithøvundurin Bjarne Åkesson Filholm er í løtuni í ferv ið at skriva eina bók um DFDS skibið m/s "Dronning Alexandrine"sum var bygt í 1927 á A/S Helsingørs Jernskibs og Maskinbyggeri.

Skipið sigldi í mong ár á rutuni millum Keypmannahavn og Tórshavn, umframt at tað eisini onkuntíð sigldi til Íslands og Grønlands. Dronning Alexandrine var best kend undir navninium Drotningin í Føroyum. Tá Drotningin gavst at sigla í 1965, varð skipið upphøgt í Hamburg.

Bjarne Åkesson Filholm hevur áður skrivað bøkur um føroysk skip sum t.d. bøkurnar "Tjaldur", "Fire skibe med navnet Tjaldur" og "Norsøens Hurtigløbere".

Í sambandi við at hann skrivar um m/s "Dronning Alexandrine" ynskir hann at koma í samband við fólk sum eiga myndir av skipinum ella annað tilfar. Eisini er hann áhugaður í onkrum søgum, kanska skemtisøgum, sum hava við Drotningina at gera. Áhugaði eru vælkomin at venda sær til: Bjarni Åkesson Filholm, Virkelyst 45, DK-9800, Hjørring, tel. 98 92 04 18. e-mail: bjarni@filholm.dk



*m/s Dronning Alexandrine*



*Rithøvundurin Bjarne Åkesson Filholm*

# TØKK

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá kæri maður mín

**Levi Gerðisheim**

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

***Familjunnar vegna***

**Ingrid**

## Kommandørarnir siga farvæl

### Kommandørarnir Carl og Gudrun Lydholm koma at hava farvælmøti í Frelsunarherinum í Tórshavn sunnudagin 10. oktober.

11. juli 2005 fekk Frelsunarherurin í Føroyum, Noreg og Íslandi nýggjar kommandørar (landsleiðarar). Tað var danska parið Carl og Gudrun Lydholm. Tey hava útbúgving sum offiserar í Frelsunarherinum og gingu í skúla í altjóða offisersskúlanum í London 1965 og 1966. Tey giftust í 1967, og eiga trý børn.

Í teirra tænastu sum frelsisoffiserar hava tey millum annað havt ordrar sum korpsleiðarar í Danmark og í Onglandi. Tey hava verið divisjónsleiðarar (økisleiðarar), finanssekretær, redaktør fyri Krigsropet (vikublaðið hjá Frelsunarherinum), generalsekretær fyri Russland, havt ábyrgdina av eftirútbúgvingini hjá teimum russisku offiserunum, og tey hava verið kommandørar fyri Finnland og Estland.



Carl Lydholm hevur verið virkin í tvørkirkjuliga arbeiðinum í Danmark, har hann var limur í Nordisk Økumenisk Råd og Økomenisk Fællesråds forretningsudvalg, har hann eisini eitt tíðarskeið var næstformaður.

Gudrun Lydholm hevur eksam í Teologi frá Københavns Universitet (Cand. teol). Hon var limur í Frelsesarmeens International Doctrine Council frá 1992-2004. Hon hevur verið virkin í tvørkirkjuliga arbeiðinum í Danmark, hon var limur í studiekomiteen og í altjóða ráðnum í Økomenisk Fællesråd. Eisini hevur hon verið í Det Danske Bibelselskab.

Ein nýggj tilvera byrjar 30. november, tá tey hava sín síðsta arbeiðsdag sum kommandørar. Men áðrenn tað, skulu hjúnuni á eina langa rundvitjan, har tey koma at hava farvæl møtir. Tey vitja teir størstu býirnar í Noregi, Íslandi og Føroyum. Tá rundvitjanin er liðug, bíðar teimum ein tilvera sum pensjonistar í Keypmannahavn. Tey ætla sær tó ikki at sita hendur í favn, tey hava ætlanir um at skriva bók, gera okkurt filmarbeiði, og ikki minst fara tey at verða omma og abbi, tey eiga 9 ommu-abbabørn.

